

Bergtóra Høgnadóttir Joensen

# Bleytu virðini raðfest - ein aprílsøga!

Um vikuskiftið skrivar Hans Pauli Strøm, at bleytu virðini eru raðfest hjá sitandi samgongu. Havi verið framsøgufólk hjá Tjóðveldi í almannamálum seinastu smáu trý árini. Hesa tíðina havi eg millum annað viðgjørt øll sosialpolitisk mál hjá samgongu og andstøðu. Heilt einfalt kann staðfestast at: Bleytu virðini eru ikki raðfest hesa tíðina – tvørturímóti.

Prógv? Lat meg nevna nøkur dømi, har fólk hava kent og framvegis kenna sviðan av væntandi raðfesting:

- Hoyritólsbrúkarar skulu sjálvir rinda 2000 kr fyri hvørt hoyritól
- Foreldur sum hava fyri neyðini at vera heima hjá barni vegna brek ella sjúku, eru í fleiri førum farin niður í løn
- Fólk fáa skerda/missa heimahjálp
- Stuðul til dagtilhald er tikin burtur
- Javningin á almannaveitingum fór fyrst úr 4 niður í 3% - nú dettur hon væntandi burtur
- 67 – 70 ára gomul hava mist rættin til sjúkradagpening
- Fyrst var setanarsteðgur ymsastaðni í Nærverkinum, nú verður talan um millióna-sparingar
- Menningarhjálpin er skerd
- Framvegis er ikki lýst eftir tannlækna til landssjúkrahúsið. Hetta ávirkar serliga sálarsjúk og børn
- Útbúgvingarstuðulin lækkar

Kundi nevnt fleiri enn hesi 10 dømini. Ræðandi? Ja, og enn verri er, at fleiri uppskot eru trumfað ígjøgnum uttan hoyringar, so hvørki málbólkur ella fakfólk er komin til orðanna. Eisini hevur talan í fleiri førum verið um lítla og onga skiftistíð.

Hans Pauli Strøm finst í greinini at, at miðlarnir ikki siga sannleikan um allar tær bleytu raðfestingarnar hjá samgonguni. Hvussu ber tað tá til, at bæði yrkisfeløg, Javni, brúkarar, avvarðandi og fakfólk gera vart við sína ónøgd og sín ótta? Í vikuni segði landsstýriskvinnan enntá í miðlunum – loksins og nakað seint – at nú kundi hon ikki spara meir. Tí so fillaði hon systemið sundur.

Løgi, at so mong – og úr at kalla øllum sjónarhornum - síggja veruleikan so øðiliga nógv øðrvísi enn Hans Pauli Strøm.
















## SKRIVSTOVUHØLI YTST Á ARGJABOÐA

Hølini eru nýumvæld og hava framúrskarandi útsýni yvir fjørðin. Til ber at leiga allan bygningin ella hvørja hædd sær.

Meira fæst at vita við at ringja til **Rasmus Magnussen á telefon 794 270.**

BYGNINGURIN HEVUR:

- 4 hæddir
- Góð parkeringsviðurskifti
- Framúr útsýni
- Allar tøkniligar innleggingar

SENDISTOVAN




Verandi stjóri á Brunaumsjón Landsins fer frá vegna aldur, og søkt verður eftir nýggjum stjóra.

Samstundis verða uppgávur stovnsins víðkaðar til eisini at fevna um tilbúgvingarsamskipan og tilbúgvingarumsjón.

***Høvuðsuppgávan er at hava ábyrgd av dagligu leiðsluni á stovninum við serligum atliti at***

- Málum, avrikum og meginsetningum stovnsins
- Samskipan og ráðgeving um tilbúgvingar- og brunamál, herundir at tilevna reglugerðir, kunngerðir og lógir
- Játtanum, fíggjarviðurskiftum og starvsfólkaviðurskiftum
- Málsviðgerð, fyrisiting og avgreiðslu

***Almennu førleikakrøvini eru***

- Útbúgving, ið kann setast í samband við virkisøki stovnsins
- Innlit og royndir innan tilbúgving hjá landi og kommunum
- Innlit í skipanir, reglugerðir og ásetingar, ið viðvíkja brunatrygd
- Leiðsluroyndir ella leiðsluførleikar, umframt royndir, ið knýta seg at virkisøki stovnsins

***Setanartreytir***

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini.

***Umsóknir***

Skrivligar umsóknir við avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast við vanligum brævi til Fiskimálaráðið, stílað til Rógva Reinert, aðalstjóra, Postsmoga 347, 110 Tórshavn ella við teldubrævi til rogvi.reinert@fisk.fo
**Umsóknarfreistin er 25. oktober 2010.**

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, á telefon 35 30 30.

Fiskimálaráðið

*Brunaumsjón Landsins virkar eftir løgtingslóg um eldsbruna og kunngerðum sambært hesi lóg. Stovnurin fær nýtt navn í næstum: Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins. Á stovninum virka í løtuni trý fólk: stjóri og tveir málsviðgerar. Virkisøki stovnsins fevnir í høvuðsheitum um almenna trygd í samstarvi við allar viðkomandi partar. Stovnurin húsast á Tinghúsvegnum í Havn og er skipaður sum sjálvstøðug bygnaðarlig eind undir Fiskimálaráðnum.*

SENDISTOVAN